# Ramsar arbeiðið, sum varð gjørt í Skúvoynni í 2025

Jóhannis Danielsen 15-12-2025

**Endamál.** Endamálið við teljingunum á Skúvoynni er at fáa langar tíðarseriur, og tí verða somu teljingar í flestu førum endurtiknar á hvørjum ári. Í summum førum, har tað tekur langa tíð at telja, ganga fleiri ár ímillum teljingarnar.

## Høvdin

### Teljing av fugli eftir myndum

Lomvigin í Høvdanum hevur verið taldur á hvørjum ári síðani 1972, undantikið í 1975. Fram til 2017 varð fuglurin taldur beinleiðis við kikara, sum økti 25 ferðir. Síðani tá hevur fuglurin verið taldur á digitalum myndum í høgari góðsku. Síðani 2001 er eisini ritan og havhesturin taldur og skrásett verður, hvussu nógvir ungar koma undan. Fyri at kunna skráseta, hvussu nógvir ungar koma undan, er neyðugt at telja tríggjar ferðir. Høvdin varð tí avmyndaður tríggjar ferðir.

**Myndir vóru tiknar av øllum Høvdanum til at telja lomviga, ritu og havhest eftir.**
Fuglurin verður taldur eftir myndum á telduni. Hetta tekur o. u. ein mánað. Myndirnar verða tiknar hesar dagar:
Umleið 15. juni: 350 myndir til at telja lomviga, ritu og havhest eftir.
Umleið 25. juli: 350 myndir til at telja ritungar eftir.
Umleið 15. augst: 350 myndir til at telja havhestaungar eftir.

**Lomvigi**: Lomvigin verður taldur á øllum, o.u. 300, plássunum. Fyri hvørt pláss verður skrásett talið á lomviga.
**Rita:** Ritan í øllum Høvdanum verður tald. Tá ið pisurnar eru um at vera floygdar, verður talið av pisum og ritum skrásett á sama hátt.
**Havhestur:** Havhesturin verður skrásettur beinleiðis á myndir av øllum Høvdanum, so úrslitið frá hvørjum einstøkum reiðri verður funnið. Tá ið ungarnir eru um at vera floygdir, verður skrásett hvussu nógvir ungar eru.
Mannagongdin er broytt nakað síðan 2020, við tað at uml. 350 myndir vórðu tiknar at telja eftir, ístaðin fyri 50. Hetta var gjørt fyri at fáa betur loysni á myndunum, og harvið betra um møguleikan at síggja allan fuglin.

Teljingarnar ið eru gjørdar av lomviga, ritu og havhesti um somu tíð sum undanfarin ár eru við í hesi frágreiðing, eins og undanfarin ár (Mynd 1).




Mynd 1. Samlað tal av lomviga, ritu og havhesti í Høvdanum, Skúvoy frá 1972 til 2025.

Sum sæst á myndini var ein lítil vøkstur í talinum av lomviga í 2025, samanborið við 2024, og ein enn og minni vøkstur av ritu 2024 til 2025. Talið av havhesti minkaði nokkso fitt frá 2024 til 2025. Um miðan september 2023 fekk Fuglakanningarstøðin fráboðanir um at tað fleyt ein ørgrinna av deyðum havhesti úti á opnum havið. Nakrir havhestar vóru kannaðir eftir hetta, og vísti tað seg at teir høvdu fuglakrím (HPAI). Samstundis vita vit at ritan var rakt av fuglakrími ymsastaðni í 2023, og tí er ikki óhugsandi at minkingin frá 2022 til 2023 av bæði havhesti og ritu skyldast fuglakrími. Meira óvist er hvat orsøkin til minkingina av havhesti frá 2024 til 2025 er.

Fuglateljingarnar í Høvdanum verða nýttar sum indikator fyri gongdina hjá lomviga, ritu og í vissan mun havhestinum um alt landi. Tí er týdningarmikið at eftirkannað hvussu væl egnaðar teljingarnar í Høvdanum eru til hetta endamálið. Tí var orka eisini nýtt uppá tær teljingar ið hava verði um alt landið, av lomviga og ritu (mynd 2).




Mynd 2. Gongdin hjá lomviga og ritu um alt landið grunda á teljingar í 1972, 1987, 1998 og frá 2007-2014.

Sum sæt á myndini er talið av lomviga minka uml. 2/3 síðan 1972. Á mynd 1 sæst at lomvigin í Høvdanum eisini er minkaður uml. 2/3 síðani 1972 og at gongdin annars minnir nógv um gongdina um alt landið samlað. Hetta merkir at Høvdin er væl egnaður sum kanningarstað viðv. gongdini hjá lomviganum í Føroyum.

Fyrsta teljing um alt landi av ritini var í 1987, og hava vit tí ikki nøkur tøl fyri 1972 at samanbera við. Gongdin frá 1987 um alt landi minnir ógvuliga nógv um gongdina hjá lomviganum frá 1987 og fram og er minkingin gott 60% (mynd 2).

Talið av ritu í Høvdanum kann sveiggja rættiliga nógv ymsu árini (mynd 1) men samanumtikið kann man siga at minkingin í Høvdanum frá 2001 til 2024 er uml. 48%. Tí er Høvdin ikki serliga umboðandi fyri landi tá talan er um ritu.

**Sjálvvirkandi fototól**

Tvey fototól tóku 1 mynd/tíma av tveimum økjum í Høvdanum, sum vanligt, frá tí at lomvigin og ritan byrja at verpa, seinast í mai, til ungarnir eru floygdir umleið 10. august.

Tað eina myndatólið tók myndir av sonevndum hellifugli (ið ikki reiðrast), og hitt av rókum við fitt av reiðrandi fugli. Myndatilfarð finst fyri fleiri ár, men flestu myndirnar eru ikki viðgjørdar enn. Ætlanin er at nýta nakað av RAMSAR fíggjing hvørt ár til at viðgera myndirnar fyri at kanna talið av fugli gjøgnum dagin, men eingin fígging var nýtt til hesar teljingar í 2025 tí valt var at hugsavna seg um at heldur gera fleiri teljingar av Høvdanum.




Mynd 3. Sveiggj í talið av lomviga og ritu ígjøgnum dagin í Høvdanum.

Tá man ikki hevur møguleikan at gera teljingar fleiri ferð um árið á sama stað, er vandi fyri at talið er missvísandi, tí ymsikt kann ávirka talið just tann dagin man telur. Tað er eisini av stórum týdningi at man veit um talið gjøgnum dagin sveiggjar, tí hetta kann eisini hava ávirkan á niðurstøðuna um samlað tal av fugli hvørt ár. Sum sæst á mynd 3 sveiggjar talið av bæði lomviga og ritu rættiliga nógv ígjøgnum dagin. Víðari sæst at mest er til av fugli umleið á middegi og út á seinrapartin, men minkar so aftur um kvøldi.

Higartil hava myndirnar, ið verða nýttar at telja samlað tal av lomviga, ritu og havhesti eftir, verði tiknar eina ávísa dato hvørt ár. Hetta ger at talið av fugli hvørt ár kann verða ógvuliga nógv ávirka av um stórt sveiggj er í samlaða talinum frá einum degi til dags.

Í 2025 var so gott sum øll orka brúkt uppá at taka myndir og telja samlað tal av lomviga, ritu og havhesti í Høvdanum, fleiri ymsar dagar, ígjøgnum summarið. Hetta var gjørt fyri at fáa eina betri hilling av hvussu stórur munur tað er á talinum av fugli frá degi til dags. Tað er neyðugt at vita hvussu nógv dagliga talið av fugli sveiggar, fyri at kunna kannað hvørja ávirkan hetta hevur á tað ið tølini verða nýtt til, sum t.d. stovnsgongd (eins og víst verður omanfyri), gongdin í føroysku marinu vistskipanini osfr. Men hetta arbeiði er ógvuliga tíðar- og orku krevjandi og hevur øll orka, og størsti partur av fíggjingini, tí verði nýtt til hetta endamálið í 2025 (sí viðhefta roknskap).

Teljingarnar eru framvegis ikki lidnar, og krevst meira fíggjing at gera teljingarnar heilt lidnar. Úrslitini higartil vísa ein ávísan mun á tølunum av ymsu fuglasløgunum frá teljingum ið eru gjørdar við 5 dagar millumrúmið (mynd 4). Tað kann verða trupult at lesa av einari tílíkari stabbamynd um talan er um eina stóra ella lítla minking ella vøkstur, og enn truplari at meta um hvørja ávirkan hetta kann hugsast at hava, men talan er um eina minking av lomviga og ritu uppá ávikavist 9 og 12%. Hetta ljóðar kanska ikki av so nógvum, men er hetta ein størri munur enn tað onkuntíð er frá einum árið til annað. Vøksturin í talið av havhesti hesar fimm dagarnar var 33% sum er ein rættiliga stór

broyting uppá so stutta tíð. Tað er eyðsæð at neyðugt er við fleiri teljingum hvørt ár framyvir, ístaðin fyri at bert ein teljing verður gjørd, sum so niðurstøður verða gjørdar útfrá. Víðari verður neyðugt at finna fram til skilabestu loysn tá talan verður um at nýta tølini. Sum áður nevnt er talan um tíðarkrevjandi arbeiði, men vónandi kunnu úrslitini frá rest av hesum teljingunum koma við í frágreiðingini fyri 2026.



Mynd 4. Sveiggj í talið av lomviga, ritu og havhesti tveir ymsar dagar í 2025.

## Byrgisbakki - lundar

Ein telda við 16 vevmyndatólum stendur í Byrgisbakka, sum vanligt, frá 25. mai til 15. september. Vevmyndir verða tyknar inni í 14 lundareiðrum alt samdøgurið, frá tí at lundarnir byrja at verpa, til teir fara avstað aftur; frá hálvum mai til mitt í september. Útgerðin skal eftirhyggjast o.u. 14. hvønn dag, og linsurnar skulu vaskast, tá ið tær verða skitnar. Ætlanin var at stroyma upptøkurnar á heimasíðuni hjá Havstovuni, frá tí at pisurnar koma út, til tær verða floygdar. Hetta arbeiði gekk ikki sum ætla í 2026, og vóru nógvir trupuleikar við myndatólunum. Eisini vóru ymsir æðrir teldu trupuleikar. Ætlanin er at skifta alla hesa útgerð út við æðra í er lættari at viðlíkahalda og hvørs upptøkur eru lættari at viðgera, um fíggjing fæst til hetta.

## Ljósloggarar

Í samstarvi við Norsk Polarinstitut verða ljósloggarar settir á 30 lundar og 30 ritur fyri at kanna, hvar teir halda til um veturin. Fyri at kunna lesa úrslitini úr loggarunum, mugu fuglarnir fangast aftur, vónandi í 2026. Av tí at torført er at koma til ritur í Skúvoynni verða loggararnir settir á ritur í Stóru Dímun.

## Telja lundaholur

Í 1993 vóru lundaholurnar í trimum smáum lundalondum taldar. Hendan teljing var endurtikin í 2016 í einum plássi í Skorðini, og einum plássi avtrat í 2018 í Skorðini. Tað triðja plássið er suðuri í Berginum, men tað er ikki so lætt at telja, so har hevur ikki verði talt seinastu árini, og var tað heldur ikki gjørt í 2026.

## Líraveiðan

Veiðan av lírum verður skrásett frá 10.-16. September, og magar og garnar frá 50 lírum verða savnaðir.

## Data nýtsla

Teljingarnar av lomviga, ritu og havhesti í Høvdanum eru at finna á heimasíðuni hjá Havstovuni. Víðari eru teljingarnar av lomviga og ritu nýttar í grein frá 2025:
Olsen B, Anker-Nilssen T, Danielsen J, Gaard E, Hansen LJ, Jacobsen S, Jensen J-K, Olsen R, Salter I and Hátún H (2025). Half a century of environmental variability and seabird trends on the Faroe Shelf in the North Atlantic Ocean. Front. Mar. Sci. 12:1544866. doi: 10.3389/fmars.2025.1544866.

Havhestatølini frá Høvdanum verða nýtt í eini grein um havhest, ið er í gerð, og vónandi verður liðug í 2026.